# Kunngerðablaðið A

2002 Hefti 9

ISSN 0907-905X


Nr. 24 21. mars 2002

**Kunngerð**
**um**
**flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar innanoyggja**

Við heimild í §§ 7 og 8 í løgtingslóg nr. 89 frá 4. juni 1996 um Sjúkrahúsverk Føroya hevur landsstýrið ásett:

§ **1.** Sjúkrahúsverkinum er heimilað at veita flutnings- ella ferðaendurgjald eftir reglum í hesi kunngerð til persónar, ið hava rætt til fríar veitingar sambært sjúkrahúslógini.
*Stk. 2.* Flutnings- ella ferðaendurgjald verður veitt í samband við flutning millum bústað ella uppihaldsstað og viðgerðarstaðið.
*Stk. 3.* Flutningur skal fara fram við tí eftir umstøðunum bíligasta, fullgóða flutningsfari.

§ **2.** Flutningur við sjúkrabili ella øðrum flutningsfari verður veittur persónum, har støðan ger flutning neyðugan.
*Stk. 2.* Val av flutningsfari skal gerast í samráð við sjúkrahúsverkið.

§ **3.** Endurgjald fyri ferðaútreiðslur verður latið fyri útreiðslur størri enn 800 kr. í einum kallendaraári.
*Stk. 2.* Endurgjald verður veitt fyri ferðing við almennum flutningsfari ella samsvarandi upphædd.

§ **4.** Heimild er at veita sjúklingum undir 18 ár endurgjald fyri fylgjara eftir § 3.

§ **5.** Avgerðir tiknar sambært hesi kunngerð kunnu kærast til landsstýrisstýrismannin innan 4 vikur aftaná, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

§ **6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almanna- og heilsumálastýrið, 21.mars 2002

**Sámal Petur í Grund, (sign.)**
landsstýrismaður

/Turid Arge, (sign.)

Nr. 25 21. mars 2002

**Kunngerð**
**um**
**heilivágsskrá (farmakopé) og fyrimyndarreglur á heilivági**

Við heimild í § 28 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1991, verður ásett:

**§ 1.** Við galdandi føroyska farmakopé er at skilja:
European Pharmakopeia 4th Edition 2002.
European Pharmakopeia 4th Edition, 1st Supplement frá 1. apríl 2002.
European Pharmakopeia 4th Edition, 2nd Supplement frá 1. juli 2002.

**§ 2.** Danske Lægemiddelstandarder, Lægemiddelstyrelsen 2002 verður sett í gildi fyri Føroyar.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 7 frá 5. februar 2001 um heilivágsskrá (farmakopé) og fyrimyndarreglur á heilivági.

Almanna- og heilsumálastýrið 21. mars 2002

**Sámal Petur í Grund, (sign.)**
landsstýrismaður

/Turid Arge, (sign.)

Nr. 26 21. mars 2002

# Løgtingslóg
# um
# broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 4 frá 25. januar 2001, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:

"Tó verður grundupphæddin til fólkapensjón ikki javnað."

2) § 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3**. Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

**Upphæddir fyri ár 2002**

**Almannapensjónslógin**

| | Árliga kr. |
|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón - støk | 50.028 |
| Grundupphædd til fólkapensjón - gift hvør | 39.756 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón - støk | 52.032 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón - gift hvør | 41.352 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 28.224 |
| Viðbót til fólkapensjón - gift hvør | 21.840 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 51.720 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 46.704 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 16.788 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón - gift hvør | 14.568 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón - støk | 15.852 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 12.732 |
| Hjálparviðbót | 25.956 |
| Røktarviðbót | 51.804 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 24.276 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar | 44.500 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólka- og Fyritíðarpensjónistar | 66.800 |

**Løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.**

| | kr. |
|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv | 8.760 (árliga) |
| Gjald fyri umlætting | 96 (um samdøgrið) |

**Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**

| | Árliga kr. |
|---|---|
| Upphædd | 4.572 |

**Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.**

| | Árliga kr. |
|---|---|
| Barnagjald sbrt. § 5 | 9.360 |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6 | 540 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald fyri og aftaná føðing eftir § 6 | 924 (eingangsupphædd) |
| Barnagjald sbrt. § 15, stk. 1 og 2 | 9.360 |
| Økt barnagjald sbrt. § 15, stk. 3 | (Tvær ferðir upphæddina sambært § 5 ) |

3) § 5 verður orðað soleiðis:
"§ **5.** Javnaðu árligu veitingarupphæddirnar verða avrundaðar til nærmasta krónutalið, ið kann býtast við 12, tó ikki samdøgursupphæddir og eingangsupphæddir. Frádráttarupphæddirnar verða avrundaðar til nærmasta krónutalið, ið kann býtast við 100."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá og við útgjaldingini av veitingunum fyri januar mánað 2002.

Tórshavn, 21. mars 2002

Anfinn Kallsberg, (sign.)
løgmaður

Lm. 54/2001

Nr. 27 21. mars 2002

**Løgtingslóg**
**um**
**broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 6. mars 1998, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Løgtingsmenn verða valdir fyri fýra ár í senn. Løgtingsumboð, ið verið hava, falla burtur, tá ið nývalda Løgtingið er sett."
2) § 20, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2* Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum bygda(r)ráðið/býráðið ávísir, har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða."
3) § 22 verður orðað soleiðis:
"**§22** Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg."
4) Í § 26 verður í litra a sett sum pkt. 2:
"Blindur ella sjónveikur persónur kann tó krevja hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á."
5) Í § 27 verður sett sum stk. 3:
"*Stk. 3* Valstýrið skal síggja til, at veljararnir ikki verða órógvaðir ella ávirkaðir av valagitatión ella øðrum í valhølinum, ella beint við valhølið. Øll, sum eru í valhølinum, skulu annars gera eftir boðum frá valstýrinum."
6) § 39, stk 2, nr. 2 verður orðað soleiðis:
"Eina váttan frá tí ella teimum, ið hjástødd hava verið, tá ið fylgibrævið er undirskrivað, um, at undirskriftin er sonn, og at staðar- og dagfestingin er bein, og at atkvøðugreiðslan er farin fram, uttan at onnur hava verið hjá. Váttanin skal vera undirskrivað við egnari hond og við tilskilan av fullum navni, starvi og bústaði."
7) Allastaðni har orðið "stk." hevur tilvísing til eitt tal, skal talið standa aftan fyri orðið.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 21. mars 2002

Anfinn Kallsberg, (sign.)
løgmaður

lm. 63/2001

Prent: Dimmalætting 341200